

Ikki færri enn tvey frálandsskip, sum arbeiða vestan fyri Hetlandi, hava ligið við bryggju í Havn, nú tey skifta manning og fáa ymsar tænastur her. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Arbeiða hinumegin markið - skifta manning í Havn

Deil:

**Jan Müller**

09.02.2015 - 16:43

Oljan.fo

Hóast sera avmarkað oljuvirksemi er á føroyska landgrunninum, so er nógv virksemi beint hinumegin markið, har fleiri av heimsins oljurisum byggja út olju- og gasskeldur. Tað krevur nógv stór og góð frálandsskip. Og hóast skipini hoyra heima í Aberdeen, so kemur tað meira enn so fyri, at tey leggja leiðina til Føroya at skifta manning og keypa ymsar tænastur. Í løtuni liggja tvey av hesum skipum í Havn. Her hevur verið manningarskifti og eisini bunkring og proviantering hevur verið á Vestaru Bryggju.

Ein høvuðsorsøkin til at skip, sum arbeiða í frálandsvinnuni vestan fyri Hetland, koma til Føroya at skifta manning er tann, at hesi skipini skulu í eina útlendska havn einaferð um árið fyri at kunna brúka fyrimunir. ið skattalógin í Bretlandi gevur teimum. Men tað hendir eisini, at hesi skipini koma til Føroya at kroka og fyri at keypa aðrar tænastur. Eitt nú hevur MEST umvælingaruppgávur í hesum sambandi. Við hesum báðum skipunum hava tilsamans 5 frálandsskip verið á Havnini í hesum árinum. Oljan.fo vitjaði umborð á skipunum.

Sí komandi greinar á oljuportalinum, har vit fara at hoyra um virksemið nær markið. At Atlantic Airways í summar fer at flúgva millum Vágar og Edinburg verður mett at kunna hava við sær, at fleiri skip fara at koma til Føroya at skifta manning.